

## Súni neyvan klárur til superliguna

Tann 19. juli spælir AaB sín fyrsta dyst nýggja kappingarárinum í Danmark. Fyrsti dysturin hjá AaB verður á heimavølli ímóti Viborg. Jón Rói Jacobsen spælir ikki aftur í hesum árinum, tí hann hevur fingið álvarsaman knæskaða. Ivasamt er eisini, um hin føroyski spælarin í AaB, Súni Olsen, verður klárur til fyrsta dystin í superliguni. Súni stríðist við ein skaða, og sambært fysioterapeutinum hjá AaB, so er tað ivasamt, um Súni fær spælt ímóti Viborg.

## Chelsea og Arsenal skoraðu mest

Chelsea og Arsenal hava havt 16 spælarar við til HM-endaspælið í Týsklandi, og tí er tað kanska heldur ikki so løgið, at spælarar hjá hesum báðum feløgum hava skotið flest mál í kappingini. Spælarar, sum dagliga umboða Arsenal og Chelsea, hava skotið 16 mál – 8 mál til spælarar úr hvørjum felagi. Hóast Arsenal og Chelsea bæði eru ensk feløg, so er tað bert ein enskur spælari, ið umboðar hesi feløg, sum hevur skotið mál í HM. Tað var Joe Cole.

# Stígur komin í hjá GÍ og HB

**Einasta liðið, sum megnar støðug úrslit, er EB/Streymur, ið eftir fulla úrtøku í Gøtu hevur beina kós móti fyrsta meistaraheitinum**



*EB/Streymur dregur frá hinum liðunum, meðan GÍ tykist steðga upp og hevur bert fingið tvey stig í fýra dystum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

16. UMFAR

*Jóannes Hansen*

Nú er bara eitt umfar eftir av landskappingini, áðrenn fótbólturin fer í summarfrí. Steðgurin verður longri, enn tað av fyrstan tíð sá út til, at hann skuldi verða. Sambært skipanini verður 17. umfar spælt næstu dagarnar. Fýra feløg skuldu eisini havt spælt tvær hálvfinalur og tvey feløg finalu á Ólavsøku. Hetta er alt útsett.

Nú eru tað avbjóðingarnar í europeisku kappingunum, sum eru á skránni. Tær eiga B36, Skála og GÍ. B36 er í hesi vikuni á Malta, og teir skulu í næstu viku spæla á heimavølli. Skála skal hósdagin spæla á heimavølli, og so skulu teir hósdagin 27. juli spæla í Kristiansand. GÍ skal hósdagin spæla í Letlandi, og 27. juli skulu teir spæla á heimavølli.

Úrslitini í landskappingini higartil boða frá, at tað hjá teimum flestu gongur nógv upp og niður. Einasta undantakið er EB/Streymur. Oddaliðið styrkti við 2-0 sigri í Gøtu sunnudagin um sína støðu. Felagsliðið hevur tapt tvær ferðir í Runavík. Annars hava teir hvørja ferð fingið úrtøku, og sera týdningarmikli sigurin í Gøtu var tann tíggjundi í hesum kappingarárinum.

GÍ og KÍ eru longu farin í summarfrí frá landskappingini. Fyri gøtumenn man steðgurin kennast sera kærkomin. Tá ið teir 14. juni vunnu 2-1 á HB í Gundadali, tóktist tað sum um, at gøtumenn rættuliga høvdu hug at bjóða EB/Streymi av í toppinum. Síðani tá hevur GÍ burtur úr fýra umførum fingið tvey stig. EB/Streymur hevur fingið sjey stig, og tað skal vilja illa til, um teir ikki fáa trý stig afturat hóskvøldið, tá ið ÍF skal á Mølina.

Tvey stig til GÍ og ivaleyst tíggju til EB/Streym í fýra umførum ber við sær, at møguleikin hjá GÍ nú ikki bara er treytaður av, at teir sjálvir syrgja fyri úrtøku, men er eisini treytaður av, at tað fer at steðga upp hjá EB/Streymi. Higartil hevur einki bent á, at hetta síðsta skal gerast veruleiki.

### HB-lagið er einki serligt

Hjá KÍ kemur summarsteðgurin ikki so væl við, sum hann ger tað hjá GÍ. Burturúr fýra teimum síðstu ferðunum hevur KÍ fingið átta stig. Serliga søtt hevur tað verið hjá teimum at fáa fulla úrtøku burturúr tveimum teimum seinastu royndunum. 2-1 á heimavølli móti Skála var bara onnur ferðin higartil í ár, at tað hevur eydnast at fingið fult á heimavølli. Royndir við útlendskum spælarum eru ofta ivasamar. At Christian Lundberg er plettskot í Klaksvík er óneyðugt at undirstrika.

Í HB er hýrurin einki serligur. 1-1 í Vági eigur at kennast sum meiri enn bara tap av tveimum stigum. Í fýra teimum seinastu royndunum hevur tað ikki eydnast HB at fáa fulla úrtøku. Burturúr hesum umførunum hava havnarmenninir fingið tvey stig! Tað man vera langt ímillum, at HB úrtøkan er so lítil.

B36 og NSÍ skulu ikki spæla fyrrenn 23. august. B36 er upptikið av Europa Cup, og FSF hevur lurtað eftir NSÍ, sum heldur hevur viljað havt uppgerðina í høvuðsstaðnum útsetta enn framskundaða. Fyri uppgerðina av kappingini er hetta eitt sindur harmuligt, tí nú fara tað at ganga meiri enn seks vikur, áðrenn øll feløgini fara at hava spælt sama tal av dystum.

Hóast Skála ikki hevur spælt sum møguligur niðurflytari, so gongst tað illa hjá silvur vinnarunum í fjør og Europa Cup luttakarunum at fáa stórvegis fjarstøðu til keðiligu strikuna. Úrslitini hesa ferð lagaðu tað soleiðis, at nú er munurin aftur til 9. plássið bara trý stig, og tað er ikki nóg.

VB/Sumba hevur fingið stóra tilgongd, og tað hevur borið ávøkst. VB/Sumba hevur ikki tapt tríggjar tær síðstu ferðirnar, sum hava givið fimm stig.

Mótbrekkan hjá møguligum tapara í botnuppgerðini á Svangaskarði hevði verið ógvuliga brøtt. Tí var 1-1 ikki óvæntað úrslit. Vánaliga gongdin higartil kostaði undan vikuskiftinum Jóannesi Jakobsen sessin sum B68 venjari. Merkisvert er tað, at kappingin skuldi verða meiri enn hálvrunnin, áðrenn fyrsti venjarin varð skiftur út.

Í 17. umfari verður spælt soleiðis: EB/Streymur-ÍF (hóskvøldið), HB-B68, NSÍ-VB/Sumba og Skála-B36 spæla sunnudagin.

## Maltesar styrkja seg

**Birkirkara tekur ikki lætt upp á dystin ímóti B36 týskvøldið. Fýra nýggir spælarar eru júst komnir til felagið úr Italia, Póllandi og Fraklandi**

CHAMPIONS LEAGUE

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

B36 spælir týskvøldið fyrra dystin í fyrsta innleiðandi umfarinum í Champions League. Føroysku meistararnir eru farnir til Malta at spæla ímóti Birkirkara.

Liðið av Malta ætlar sær veruliga nakað, tú teir hava styrkt seg við fýra spælarum beint undan dystinum ímóti B36.

Tveir miðvallarspælarar eru komnir úr Italia. Annar er 28 ára gamli Angelo Paradiso, sum hevur spælt ungdómsfótbólt í kenda felagnum Lazio, og hin er 25 ára gamli Guido Gallovich.

Úr Póllandi hevur Birkirkara fingið nýggjan málmann, 29 ára gamla Andrzej Bledzewski, og úr Frakland er 19 ára gamli miðvallarin Hatim Sbai komin til Malta.

Birkirkara leggur nógv fyri í royndini at koma víðari í kappingini, og á Malta vita teir líka so væl sum í B36, at dysturin í næsta umfari kann gerast sera gevandi. Tá verður mótstøðuliðið turkiska stórfelagið Fenerbahce.

– Vit ætla at gera okkara ítarsta fyri at koma víðari í hesi stórfingnu kapping. Tí hava vit styrkt munandi um liðið til dystirnar ímóti B36. Hinvegin kemur tað illa við, at fleiri av okkara stuðulsspælarum fáa viðgerð fyri skaðar, sigur Victor Zammit, forseti í Birkirkara.

Dysturin millum Birkirkara og B36 verður spældur týskvøldið á Malta.